# Skúlárið 2026-27

## Vælkomin til innskriving í 1. flokk – Ein góð byrjan í skúlanum

Góðu foreldur 🌟

Tað er ein stórur dagur, tá barn tykkara byrjar í skúla. Vit gleða okkum at taka væl ímóti tykkara barni, og at arbeiða saman við tykkum fyri at skapa eina góða, trygga og mennandi skúlabyrjan.
Ein góð byrjan byggir á **góðar vanar**, **tryggleika**, **trivnað og samstarv millum skúla og heim**.

# Skúlárið 2026-27

## Heimasíðan

www.skopunarskuli.fo



Skopunar Skúli

# Góðar vanar í gerandisdegnum

Tit kunnu hjálpa barninum at fáa eina góða skúlabyrjan við at:

- Tryggja **regluligan svøvn** og fasta songartíð
- Syrgja fyri **morgunmati**, áðrenn farið verður í skúla
- Venja barnið við **at koma til tíðina**
- Læra barnið at lurta **eftir**, **bíða eftir tørni og vísa virðing**
- Venja barnið við **at taka ábyrgd** (skúlataska, klæði, lutir)

## Tryggleiki og sjálvsálit

Tað er umráðandi, at barnið kennir seg trygt og vónríkt:

- Rósið barninum og styrkið **sjálvsálitið**
- Vísið áhuga fyri tí, barnið upplivir í skúlanum
- Hjálpið barninum at **seta orð á kenslur**
- Minnið barnið á, at tað er **í lagi at gera feil – vit læra av teimum**

## Vinir og trivnaður

Í 1. flokki læra børn nógv um vinalag og samveru:

- Tosið við barnið um **at vera ein góður vinur**
- Vísið, hvussu ein **deilir, hjálpir og tekur atlit**
- Eggið barninum at **vera við í spæli og felagsskapi**

# Læring og áhugi

Tit kunnu stuðla læringini við at:

- Lesa saman við barninum
- Tosa um **bókstavir, tøl og orð** í gerandisdegnum
- Vísa, at **læring er spennandi og stuttlig**

# Samstarv millum heim og skúla

Eitt gott samstarv ger stóran mun:

- Takið samband, um tit hava spurningar ella stúran
- Stuðlið barninum í at fylgja **reglum og mannagongdum í skúlanum**
- Møtið til **fundir og tiltøk**

Annbritt F. Mortensen og Gitte Klein vísa m.a. á í bókini *Mennandi Sálarfrøði*, hvønn týdning Uppmerksami, Hondskrift, Egið Tamarhald og Venjing hevur fyri, hvussu væl børn klára seg seinni í lívinum.

Skopunar Skúli

## Uppmerksami

Uppmerksami er grundarlagi undir allari læring. Uttan uppmerksami og hugasavning er trupult at læra og mennast. Meiri uppmerksom tú ert, betur verður innihaldið viðgjørt og goymt.

Verður uppmerksami savnað um tað, ið lærast skal, verða tey øki í heilanum virkin, sum hava við hetta at gera. Tá ið økini gerast virkin, verður tað lærda fest í minnið. Uppmerksami og lívsgóðska hanga saman

## Hondskrift

Tað er týdningarmikið, at størri dentur verður lagdur á at skriva við hond serliga fyrstu skúlaárini í innskúling og miðdeild. At skriva við hond, stuðlar allari læringartilgongdini og lesi- og skriviførleikanum.

Vit skulu læra børnini at skriva við hond, tí tað ger, at tey læra betur at lesa og skriva. Fleiri kyknur í heilanum fara at samstarva, og barnið arbeiðir djypri við tí, tað ger.

Harumframt skulu vit tora nógv betur at seta krøv til, at næmingurin ger sær ómak við skriftini, tí í ómakinum liggur somuleiðis ein eykaviðgerð, ið økir sannlíkindini fyri, at tað endar í langtíðarminninum.

Tá ið vit skulu læra okkurt nýtt, skal tað viðgerast í djúpt og gjølla. Endurtøkur skulu til, áðrenn tað verður automatiserað og flutt yvir í langtíðarminnið.

## Týdningurin av hondskrift

Ein nýggjari kanning av lesiførleikanum hjá 6000 kinesiskum børnum í 3., 4. og 5. flokki vísir at lesiførleikin er nógv versnaður eftir at farið er frá at skriva við hond.

Eftir at farið er frá at skriva við hond, er talið av næmingum í fjórða flokki, ið ikki dugir at lesa, meira enn 40%. Í fimta flokki er talið yvir 50%.

Sama kanning varð eisini gjørd fyri baði 10 og 20 árum síðan. Í gomlu kanningunum varð staðfest, at millum 2% og 8% av næmingunum høvdu lesitrupulleikar í 3., 4. og 5. flokki..

## Egið tamarhald

Ein kanning vísti m.a., at egið tamarhald er dupult so týdningarmikið fyri framtíðarútlitini sum intelligensur.
Eitt barn, sum ikki venur egið tamarhald heima, dugir ikki at nýta egið tamarhald í sosialum sambondum ella á stovni og í skúla.

## Venjing

Annbritt F. Mortensen og Gitte Klein vísa eisini á í bókini *Mennandi Sálarfrøði*, hvønn týdning venjing hevur, og hvørji úrslit spyrjast burturúr.

Tær vísa á, at avrikið hjá tveimum persónum, sum hava somu umstøður, er tengt at tveimum faktorum: evnum og innsatsi. Evnini hava sjálvandi ein ávísan týdning, men orkan, ein leggur í arbeiði hevur tvífaldan týdning.

Skopunar Skúli

**Vit gleða okkum at arbeiða saman við tykkum.** Saman kunnu vit skapa eina **trygga, gleðiliga og mennandi skúlabyrjan.**

**Vælkomin í 1. flokk!** 💛